# VIÐMERKING

## Almenna orðaskiftið um Skálafjarðartunnilin

P/f Skálafjarðartunnilin handaði 17. januar 2007 umsókn til Føroya Landsstýri um at sleppa at skapa eitt fast beinleiðis samband millum armarnar á Skálafjørðinum og Suðurstreymoy. Í umsóknini er dentur lagdur á, at endaliga loysnin skal veljast í samstarvi við myndugleikarnar, og at Løgtingið hevur endaligu avgerðina. Somuleiðis, at tað skal vera javnvág millum samfelagsins áhugamál og handilsligu áhugamálini hjá felagnum. Síðani hevur orðaskiftið um Skálafjarðartunnilin ment seg, og viðkomandi evni eru viðgjørd.



### Alment ella privat?

Eitt evni hevur verið, um verkætlanin eigur at vera almenn heldur enn privat. Grundgevingin hevur verið, at hetta kundi tryggja, at verkætlanin verður so bílig sum gjørligt, og at privatir íleggjarar ikki fáa órímiliga stóran vinning burturúr. Tá ein arbeiðsbólkur á sinni setti sær fyri at kanna, um verkætlanin kundi gerast á einum handilsligum grundarlagi, var hetta gjørt, tí mett varð, at tað var lítið sannlíkt, at tað almenna vildi átaka sær uppgávuna. Í øllum førum fór verkætlanin at verða raðfest lágt, tí so nógvar aðrar verkætlanir eru á samferðsluøkinum, og hetta hevði helst ført við sær, at tað fór at taka langa tíð at fremja ætlanina.

Tað hevur eisini verið ført fram, at vandi er fyri at kostnaðurin kann gerast størri, tá eitt privat heldur enn eitt alment partafelag stendur fyri ætlanini; men tá hugsað verður um, at tað almenna ongan fíggjarváða hevur í sambandi við eina privata fígging, er hesin lítli vandin skjótt uppvigaður. Almennir pengar verða ikki bundnir í hesi verkætlanini og kunnu í staðin brúkast til aðrar íløgur. Í tráð við hetta er ásett at felagið endurrindar kommununum við Skálafjørðin allar útreiðslur, tær hava havt í fyrireikingararbeiðinum. Privat fyritakssemi er ein týdningarmikil partur av samfelagnum og kann føra til, at ætlanir, sum annars møguliga ikki høvdu blivið til, kunnu skapast og fremjast til gagns fyri alt samfelagið.

### Bara fyri egnan vinning?

Skálafjarðartunnilin er eitt eindømi í Føroyum um eina samferðsluverkætlan, sum bæði samfelagið, brúkarar og íleggjarar fáa ágóða av. Verkætlanin er skapt av fólki á Skálafjørðinum. Hon hevur verið fyrireikað í fleiri ár, og fyrireikingararbeiðið hevur kostað fleiri milliónir.

Arbeiðsbólkurin og P/F Skálafjarðartunnilin hava alla tíðina vitað og havt virðing fyri, at myndugleikarnir sjálvandi fóru at seta krøv til verkætlanina, sum skulu tryggja, at eigarar og íleggjarar ikki fáa órímiligar fyrimunir av ætlanini. Eisini varð væntað, at krøv fóru at koma, sum skulu tryggja, at verkætlanin er í tráð við ætlanirnar fyri samferðsluni í síni heild.

Útrokningar vísa, at verkætlanin kann hanga saman fíggjarliga. Men hon er ikki uttan váða. Gongur arbeiðið illa, kann felagið missa nógvan pening. Gongur raksturin eftir ætlan, kann tunnilin verða goldin eftir 25-30 árum. Tá verður tunnilin latin landinum uttan kostnað.

Væntandi verða eisini treytir í loyvinum, sum skulu tryggja, at nýtslugjaldið ikki verður hægri, enn at inntøkurnar haðani kunnu fíggja rakstur, innkrevjing, lánsgjøld og harumframt geva eitt rímiligt avkast av partapeninginum í mun til váðan, soleiðis at verkætlanin kann fíggjast av privatum íleggjarum, bæði stovnum og einstaklingum. Ætlanin er, at allir føroyingar skulu hava møguleika at tekna partapening.

Samanumtikið kann sigast, at loyvistreytirnar javnseta skyldurnar hjá felagnum við møguleikanum at krevja inn nýstlugjald. Møguligur ágóði verður avmarkaður og tunnilin verður latin landinum fyri einki, tá ið loyvistíðin er úti.

### Samfelagsvinningur

Skálafjarðartunnilin fer at stytta munandi um ein stóran part av farleiðunum millum landspartarnar í Føroyum. Á tann hátt bøtir verkætlanin um møguleikarnar fyri øktari samferðslu, samvinnu og dynamikki í samfelagnum, samstundis sum hon skapar grundarlag fyri nýggjar vinnu- og búskaparmøguleikar. Samfelagið fær stóran ágóða av Skálafjarðartunnilinum við at til dømis farleiðin millum Havnina og landnyrðingspartin av Føroyum verður nógv styttri. Teinurin úr Havn inn á Skálafjørðin verður styttur einar 40-50 km, og teinurin til Klaksvíkar verður 30 km styttri. Hvør kilometur verður mettur at kosta brúkarunum og samfelagnum umleið 3 krónur (tíð, brennievni, slit á akfari og vegum osfr.). Á henda hátt ber til at siga, at tað kostar samfelagnum og brúkarunum umleið 2 mió. krónur fyri hvørja viku, bíðað verður við tunlinum. Tað liggur tí ein stórur samfelagsvinningur í, at felagið kann fremja ætlanina beinanvegin.

Byggingin av Skálafjarðartunlinum fer at minka munandi um trýstið á aðrar farleiðir, og sostatt verður raksturin og íløgurnar í hesar farleiðir bíligari. Aftur her sparir landið pening orsakað av tunlinum. Hendan sparing kann til dømis nýtast til at útbyggja vegirnar ið ávirkast av tunlinum.

### Umhvørvi

Lendi og umhvørvi er ein sera umráðandi partur av arbeiðinum við Skálafjarðartunlinum. Tað er umráðandi, at náttúran verður vard. Miðlinjan við 3 tunnilsmunnum, ið felagið hevur víst á sum ein møguleika, er tann loysnin, ið nýtir minst lendi og hevur minst árin á umhvørvið. P/F Skálafjarðartunnilin fer tí í næstum at lata umsókn til Friðingarnevndina, eins og felagið fer at venda sær til teir lendiseigarar, sum verkætlanin væntandi kemur at ávirka.

### Framtíðarætlan

Umsókn varð herfyri handað Bjarna Djurholm, landsstýrismanni í vinnumálum. Felagið skilti landsstýrismannin soleiðis, at hann vildi leggja uppskot um heimildarlóg fyri tingið, áðrenn framløgufreistin er úti 2. mars 2007, og at hann harefter fór at taka upp samráðingar við felagið fyri at vita, um semja kundi fáast um loyvistreytir.

P/f Skálafjarðartunnilin vónar, at loyvislógin verður klár mánaðarskiftið august/september 2007, og at endaliga loyvið verður givið í november í ár. Arbeiðið við tunlinum kann byrja í 2008, og tá verður tað koyrandi millum armarnar á Skálafjørðinum og Suðurstreymoy miðskeiðis í 2012.

**Vinarliga**
**P/f Skálafjarðartunnilin**
**Ingi Høgjaard, nevndarformaður**

**Kristian Peteresen, stjóri**

**Dávid Reinert Hansen, tekn. stjóri**


# Góðskuleiðari til Bakkafrost

Vit sóknast eftir einum góðskuleiðara til laksaframleiðslu okkara í Bakkafrost samtakinum.
Talan er um nýtt starv.

Bakkafrost samtakið rekur alivirksemi í Norðoyggjum og Suðureysturoy í felagnum Faroe Salmon. Framleiðslueindirnar eru á 3 smoltstøðum og 7 sjógvalistøðum umframt á kryvjivirkinum í Klaksvík og portiónsvirkinum á Glyvrum. Okkara vøruúrval er breitt innan fyri laksavørur; men høvuðsfokusumráðið er innan vørur til retailmarknaðin serliga í ES. Talið á starvsfólkum er 160.

**Starvið**
Høvuðsuppgávan hjá góðskuleiðaranum er at skipa og standa fyri innaeftirlitinum eftir teimum góðkenningum fyritøkan hevur. Góðskuleiðarin skal menna og viðlíkahalda okkara góðskuskipan, har aðalmálið er at tryggja eina høga og støðuga vørugóðsku av okkara vørum í tráð við okkara góðskupolitikk og við nationalar og internationalar lógir og krøv. Góðskudeildin kannar og skrásetir áhaldandi allar rávørur, vørur í gerð og liðugtvørur.
Tú kemur at hava ábyrgdina av innanhýsis mannagongdum, vørugóðsku, umhvørvi og djóravælferð.
Starvið er fyriskipað sum ein stápsfunktión við beinleiðis tilvísing til stjóran.

**Útbúgving og royndir**
Tann, ið settur verður, skal hava eina hægri útbúgving sum til dømis matvøruverkfrøðingur, lívfrøðingur, djóralækni e.l. Royndir frá privatu og/ella almennu vinnuni eru ein fyrimunur, men ikki nøkur treyt.

**Setanarviðurskifti**
Til rætta viðkomandi verður latin kappingarfør løn í samsvari við útbúgving og royndir.
Talan er um fulltíðarstarv, har roknast má við skeivum arbeiðstíðum í ávísan mun. Arbeiðsstaðurin er fyrst og fremst á høvuðsskrivstovuni á Glyvrum, men eisini á framsleiðslustøðunum í Norðoyggjum og Suðureysturoy.

**Umsókn**
Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera okkum í hendi innan 23. februar 2007 og skal sendast til:

P/F Bakkafrost
Bakkavegur 8
625 Glyvrar
Bakkafrost@bakkafrost.com

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Regin Jacobsen, stjóra, á tel. 40 50 00.

Sansir.fo

**P/F Bakkafrost** · FO-625 Glyvrar · Faroe Islands · Tel: +298 40 50 00 · Fax: +298 40 50 09 · bakkafrost@bakkafrost.com